Nýtt tíðarskeið í Vágs Havnar søgu byrjað. Mynd www.vágur.fo

# Vágur letur dyrnar upp fyri oljuvinnuni

**Jan Müller**

25.10.2015 - 14:45

Oljan.fo

Í farnu viku komu tvey stór skip, ið virka innan oljuvinnuna á Vág. Talan er um stóra nýggja seismikk-skipið Polar Empress, sum er eitt hitt mest framkomna í heiminum, og hjálpar- og granskingarskipið Sanco Sky.

Kenda norska felagið Dolphin Geophysical eigur Polar Empress og hevur leigað Sanco Sky.

Skipini bæði eru komin á Vág at liggja, meðan tey bíða eftir næstu verkætlan, sum skipini skulu undir. Polar Empress liggur við kei, meðan Sanco Sky liggur úti á fjørðinum.

Skipini eru komin á Vág í góðum samstarvi við Faroe Ship, sum er agentur fyri reiðariíð Dolphin Geophysical, skrivar heimasíðan hjá Vágs kommunu.

”At skip, ið virka innan oljuvinnuna, nú koma á Vág, er uttan iva eitt úrslit av einum miðvísum arbeiði, sum bæði hetta og undanfarna býráð hava gjørt,” sigur Dennis Holm, borgarstjóri við heimasíðuna.

Seinastu 5-6 árini hevur Vágs kommuna og Vágs Havn verið á oljumessunum í Aberdeen og Stavanger. Ein týðandi liður í hesum arbeiði hevur fevnt um at byggja upp netverk, soleiðis at Vágs Havn eisini er á “radaranum” hjá feløgum, sum virka innan oljuvinnuna á okkara leiðum.

Dennis Holm, borgarstjóri, fegnast um at skipini eru komin á Vág, og ásannar, at tað hevur stóran týdning, at so kend reiðarí, sum Dolphin Geophysical brúka Vágs Havn.

”Nú eitt reiðarí hevur valt at brúka Vágs Havn og Vágsfjørð, so er hetta uttan iva eitt fet á leiðini at fáa fleiri reiðarí at brúka Vágs Havn og Vágsfjørð,” sigur Dennis Holm.

Oljan.fo skilur, at ein orsøkin til, at reiðaríið hevur valt Vág í hesum førinum er tann, at tað hevur nógv at siga at kunna liggja í eina og sama stað, til farið verður aftur til nýggja arbeiðsuppgávu. Hesa trygdina hava tey so fingið frá Vágs Havn. Royndir frá eitt nú Tórshavnar Havn, hava verið tær, at ikki ber til hjá einum útlendskum frálandsskipi av hesi støddini at hava fast keipláss í fleiri vikur, nú onnur skipaferðsla eisini skal brúka havnina.

Hetta er so eisini ein orsøkin til, at eitt nú bæði høvuðsstaðarkommunan og Runavíkar kommuna nú arbeiða við stórum útbyggingum av teirra havnum. Tá vilja hesar havnin uttan iva ikki hava nakran trupulleika við at hava eitt nú frálandsskip liggjandi í sama stað í nakrar vikur.

Sum skilst er hetta nakað offshorereiðarí hyggja neyvt at, tá tey gera av, hvørjar havnir tey brúka. Eitt skifti ljóðaði, at eitt av stóru útlendsku reiðaríiunum, Vroon, sum brúkar Lervick sum atløguhavn, varð so ónøgt við viðurskiftini, tí onnur skipaferðsla eisini skuldi vera har, at tey eitt umrøddu spurningin heilt at flyta havn. Eftir øllum at døma ein meinlík støða sum henni í Føroyum í løtuni, sum í hesum førinum gagnar vágbingum, tí har ikki er so nógv onnur skipaferðsla sum er.

Kelda: www.vagur.fo















